

# Mælir til evruna

Danski tjóðbankin hevur hildið kursin á krónuni fastan og tað hevur merkt høgar rentir, sum so aftur merkir, at tað er dýrari at vera dani. – Tað merkir, at okkara fíggjarkostnaðir verða nakað hægri og tað merkir eisini, at okkara kundar merkja eina høgri rentu, tí vit hava verið noyddir at hækka rentuna, tí tjóðarbankin gjørdi tað, sigur orðførandi stjóri í Danske Bank, Peter Straarup við danska blaðið børsen. Hann heldur, at tað hevði verið positivt, um danir fóru upp í evru-samstarvið. – Eg haldi ikki, at tað ber til at fáa Danmark upp í evru-samstarvið ein fyrrapart undir einari fíggjarkreppu, men vit mæla til, at vit fara upp í, sigur Peter Straarup. Hann heldur, at tað verður avgerandi fyri støðuna hjá krónuni, um tjóðbankin fylgir eftir, um Europeiski Miðbankin, ECB, sum væntað lækkar rentuna í komandi viku.



*Er samgngan veruliga sinnað at raðfesta samráðingarnar við privata felagið, sum tók stig til undirsjóvartunnil ímillum Streymoy og Eysturoy, kann arbeiðið upp á tunnilin byrja í 2010, so at tunnilin kann takast í nýtslu í 2014*

# Koyrandi undir Skálafjørð í 2014

**- Er samgongan veruliga sinnað at seta ferð á arbeiðið at gera undirsjóvartunnil ímillum Streymoy og Eysturoy, kann verða koyrandi ígjøgnum tunnilin í 2014, sigur Ingi Højgaard, nevndarformaður í felagnum, sum tók stig til tunnilin**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er væl hugsandi, at tað verður koyrandi ígjøgnum ein undirsjóvartunnil ímillum Streymoynna og Eysturoynna í 2014.

Men Ingi Højgaard, nevndarformaður í privata tunnilsfelagnum, leggur dent á, at skal tað eydnast, má ferð setast á arbeiðið nú.

Og hann leggur dent á, at tað vilji frá tunnilsfelagnum at fáa gongd á arbeiðið, skal ikki tróta.

Tað veldst meiri um viljan hjá politiska myndugleikanum.

- Hevur samgongan veruliga so stóran vilja at lata okkum fara undir ætlanina, sum hon hevur fráboðað, er ógvuliga sannlíkt, at tað verður koyrandi ígjøgnum tunnilin í 2014, sigur Ingi Højgaard.

## Standa við verkætlanina

Sum sæst á aðrari grein í blaðnum, hevur landsstýrið boðsent privata tunnilsfelagnum á fund longu hósdagin at tosa um undirsjóvartunnilin.

Hetta er nevndarformaðurin í tunnilsfelagnum øgiliga fegin um.

- Á hesum fundinum fara vit at greiða landsstýriskvinnuni í samferðslumálum frá, at vit avgjørt standa við ætlanina og at vit framvegis eru sinnað at fara undir verkætlanina, sigur nevndarformaðurin.

Hann sigur, at í tunnilsfelagnum eru tey altráð eftir at sleppa ígongd við verkætlanina.

- Vit vilja fegin at nakað skal henda nú, leggur hann afturat.

Men hvussu skjótt tað skal ganga, veldst alt um politisku raðfestingina.

- Verður spurningurin raðfestir nóg frammaliga hjá politiska myndugleikanum, eiga samráðingarnar um loyvistreytirnar ikki at taka meiri enn eitt hálvt ár, tí so fløkt er málið heldur ikki.

Tað merkir, at verður ferð sett á arbeiðið, nú, kann tunnilsfelagið seta nøsina upp eftir at fáa endaliga loyvi í fyrru helvt næsta ár.

- Frá tí at vit fáa endaligt loyvi gongur eitt ár til sjálvt arbeiðið kann byrja.

Hetta árið skal brúkast til at fáa projektið heilt liðugt og at útvega fíggingina.

Tað merkir, at farast kann undir sjálvan tunnilin fyrru helvt í 2010 og tá ið arbeiðið tekur fýra ár, kann verða koyrandi í 2014, sigur Ingi Højgaard.

## Arbeiða skjótt

Men hon leggur dent á, at er privata felagið framvegis sinnað at fremja ætlanina, fer landsstýrið at arbeiða víðari við málinum.

- So fara at vit gera eitt upplegg til samráðingar og at samráðast við felagið um, hvørjar loyvistreytirnar skulu vera.

Og verður úrslitið av hesum fyrsta fundinum tað, at felagið er sinnað at arbeiða víðari við verkætlanini, er landsstýriskvinnan sinnað at bera skjótt at.

- Eg haldi avgjørt, at hendan verkætlanin skal verða verandi á privatum hondum og er privata felagið framvegis sinnað at fremja verkætlanina, ætli eg, at fundirnir um loyvistreytirnar skulu vera rættiliga skjótt, sigur Annika Olsen.

Hvørjar treytirnar verða, kann hon onki siga um enn, men hon sigur, at tað sjálvandi er umráðandi at finna tað bestu loysnina, bæði fyri privata felagið, men eisini fyri landskassan og tí skulu allir møguleikar kannast og viðgerast.

> *Farið verður undir samráðingar við privata felagið um gerð av Skálafjarðartunlinum.*
> *ABC samgonguskjalið um Eysturoyartunnilin*

### FAKTA

**Ein tungur burður**

Spurningurin um undirsjóvartunnil ímillum Streymoy og Eysturoy er nú eitt gamalt mál.

Tað var longu í 2002, at einstaklingar tóku seg saman at kanna málið og í 2003 varð hugskotið lagt alment fram, har áhugin var stórur, eisini hjá politiska myndugleikanum.

Tíðliga í 2006 varð Partafelag stovnað við tí endamáli at gera undirsjóvartunnil ímillum Streymoy og Eysturoy og fast samband ímillum teir báðar armarnar á Skálafirði.

Arbeitt hevur mest verið við eini ætlan um undirsjóvartunnil úr Streymoy í Skálafjørð við eini rundkoyring á botni og einari tunnilsgrein yvir á Strendur og einari yvir á Toftir.

Tíðliga í 2007 søkti partafelagið landsstýrið um loyvi at gera tunnilin, men síðani hevur felagið bíðað eftir politikarunum og sostatt er ætlanin at kalla ongan veg komin enn.

Samgongan, sum tá sat samtykti at taka upp samráðingar við felagið um loyvistreytirnar.

Men tað dróg út, m.a. tí at løgtingið játtaði ikki umleið eina hálva millión til neyðuga uttanhýsis, serfrøðiliga tøkniliga og løgfrøðiliga ráðgeving.

Tá ið CHE samgongan tók við í januar í ár, vendist alt á høvdið. Tann samgongan vildi ikki lata tað privata felagið gera tunnilin, tí tað skuldi landið gera, samstundis sum hann skuldi verða partur í íløguraðfestingarnar hjá samgonguni.

Men so langt kom samgongan ikki, tí hon slitnaði longu fyrr í heyst.

Nýggja ABC samgongan hevur so tikið táttin upp aftur og er sinnað at lata tað privata felagið halda fram við ætlanini og nú hevur Annika Olsen, landsstýriskvinna, so sett hol á tað arbeiðið og hevur boðsent tunnilsfelagnum á fund

---

gongd, leggur hann afturat.

## Neyvan dýrari

Hann heldur ikki, at byggikostnaðurin er blivin dýrari, hóast long tíð er liðin, kanska tvørtur ímóti, nú stígur er komin í og tað verður ikki so nógv bygt longur, sum tað hevur verið.

- Hinvegin er rentan hækkað, so fíggingin er blivin dýrari, enn hon hevur verið, leggur hann afturat.

- Men talan er um eina verkætlan, sum skal ganga yvir eini 25-30 ár, so tað er skilligt, at hon má tola skiftandi tíðir.

Hinvegin heldur hann, at hóast tíðirnar eru nógv broyttar og prísirnir á bensini og olju er nógv uppfarin, metir hann ikki, at tað verður neyðugt at gera nýggjar ferðslukanningar.

- Prísirnir eru broyttir, men vit halda ikki, at broytingarnar eru so stórar, at tað krevjast nýggjar kanningar, tí ferðsla vísir seg at vera nokk so støðugt, sama, hvussu tíðirnar annars eru.

Og tørvurin á skjótum og góðum flutningi norðan av landi til Havnar, er framvegis rættiliga stórt og tað meta vit, at tað eisini verður í framtíðini, sigur nevndarformaðurin.